LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
VW Golf II 1.6 TD, árg. '91. Bilurin er í góðum standi, sær gott út og er sera økonomiskur. Hann er sýnaður tann 03.04.02.
Tlf. 220942

TIL SØLU
Nýsýnaður Toyota Corolla, árg. 87 til sølu.
Tlf. 210408

TIL SØLU
Daihatsu Rocky árg. 88, til eykadeilir, bíliga til sølu.
Tlf. 210737

TIL SØLU
Mitshubishi Pajero frá 88, bíliga til sølu.
Tlf. 210737

TIL SØLU
Fýra summardekk 175/R14 á aluminium felgum – passar til Volvo 240.
Tlf. 443048 ella 288245

BILAR TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 86, koyrir væl, men krevur ábøtur. Eisini vælegnaður sum eykalutir. Kostnaður 3.000 kr.
Tlf. 251376, e. kl. 17

BMW 525 TDs
Diesel 143 HK, 155.000 km, árg. 95. Eyka útgerð: leður innan, airbags, el-rútar, hita í setrinum, airconditión, 16" sportfelgur.
Tlf. 218321 ella 318321

OPEL ASCONA
árg. 86, til sølu fyri 8.000 kr. Bilurin krevur ábøtur, men koyrir væl. Ring á tlf. 314600, 227651 ella
423373, spyr eftir Tórhalli

DEKK TIL SØLU
Nýggj Pirelli P6000 summardekk. Stødd 195-65-15.
Tlf. 214620

FÝRA 15" SPORTSFELGUR
til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 250145, e. kl. 16

BILAR TIL SØLU
BMW 320i, árg. 93. BMW 325 TD, árg. 92. BMW 525 TDS, árg. 94. Mercedes 300 TD, árg. 97. Auto Import
Tlf. 217778 - 218778

YNSKIST
Lítil lastbilur ynskist til keyps.
Tlf. 210425

HONDA ACCORD
Ein Honda Accord 2.0 EX, árg. 87, er vælhildin.
Tlf. 231168 ella 261669

TOYOTA STARLET 1.3
árg. 1997, til sølu fyri 65.000 kr. Bilurin hevur koyrt 30.000 km, og er í sera góðum standi.
Tlf. 212560

ROVER 3500 V8
aluminium, motorur við automat gearkassa til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 211641

MAZDA 626
2.0, árg. 84, til sølu.
Tlf. 311532

ER NAKAR
sum hevur deilir til ein Isuzu MRK 75 – helst motor ella startara.
Tlf. 332893 ella 321893

SPORTSFELGUR
16" sportfelgur, 2 nýggj Bridgestone dekk 205/55 R16. Tvey brúkt Tyfoon dekk 205/55 R16 – alt fyri 2500 kr.
Tlf. 447547

BILUR TIL SØLU
VW Passat frá 1987 sera bíliga til sølu.
Tlf. 243332

YNSKIST
Baksetur til Mitsubishi pajero ynskjast til keyps. Vinarliga ring ella skriva (sms) á
Tlf 258453

FORD FIESTA 1.1
árg. 89, sýnaður 01. Til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 220626 ella 227125

RENAULT
Laguna 2.0 til sølu.
Tlf. 220311

TIL SØLU
Ein trekkjari Scania 143 og ein leguvognur Schmitz last – til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 421001 ella 212801

SPORTSFELGUR
Fýra nýggjar sportsfelgur av merkinum (Radius) 225 x 45 x 17" Passa til VW Passat, Camry o.a. Nýprísur 16.000 kr. Verða seldar fyri 9.000 kr.
Tlf. 456272 ella 221717

TIL SØLU
6 summardekk og 4 felgur – stødd 175/65 R14 – til Toyota Corolla.
Tlf. 441226

NISSAN SUNNY
árg. 87 til sølu, pikadekk, summardekk og sportsfelgur fylgja við. Ring og hoyr nærri
tlf. 257966 ella 318775

NISSAN PATROL 3.3 TD
árg. 1986, sýnaður 01.04.2001. Til sølu fyri 11.000 ella hægstbjóðandi. Hevur koyrt 290.000 km.
Tlf. 422522 ella 256041

TOYOTA COROLLA
1.3i, árg. 92, til sølu um hóskandi boð fæst. Hevur koyrt 117.400 km. Er nýsýnaður og í góðum standi. Eyka felgur fylgja við. Áhugað ring
tlf. 422405 ella 260501

SUMMARDEKK TIL SØLU
4 summardekk – sum óbrúkt – 175/65 R14 til sølu fyri 1500 kr.
Ring 284727

TIL SØLU
Ford Escort, árg. 95, koyrt 78.000 km, sær sera væl út.
Tlf. 212934

PEUGEOT 505
7 pers. árg. 84, til sølu, sýnaður 9/2001.
Tlf. 445138

OPEL ASCONA 1.6
árg. 1987, til sølu sum eykalutur.
Tlf. 315664

OPEL ASCONA
Ein reyður Opel Ascona 1.6 S er til sølu sum eykalutur. Bilurin hevur tó nummarplátur og kann koyra! Fyri at hoyra meira, vinarliga ring
tlf. 321218 ella 220402 e. kl. 16

TIL SØLU
5 nýggj Firestone summardekk, 185/65 R 14, á felgum, passa til Toyota Avensis og Carina. Nýprísur 6.675. Verða seld fyri 3.000 kr.
Tlf. 313300 - 211010

TOYOTA COROLLA
3 ára gamal Toyota Corolla 2.0 Diesel, sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst. Møguliga í býti við biligari bil. Áhugaði kunnu ringja
tlf. 255381

AUDI A4
árg. 96, myrkabláur, í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 210346

YNSKIST TIL KEYPS
Bakrútur til Peugeot 205 GTi og rútahaldari til vinstra síðurút framman, árg. 86-88. Bilurin hevur tvær hurðar.
Tlf. 361362

FORD FIESTA 1,8
diesel, árg. sept. 98, til sølu. Pikadekk á felgum fylgja við. Koyrt 88.000 km. Prísuppskot 90.000 kr.
Tlf. 264320

TIL SØLU
Myrkabláur Nissan Sunny 14 LX. árg. 92, 155 tús. km.Vælhildin og í besta standi.
Tlf. 251221

TIL SØLU
Mazda 323, árg. 1985, nýsýnaður, bíliga til sølu
Tlf. 361502

TIL SØLU
Volvo 740 við sóltaki, nýsýnaður, 1986 modell, summardekk á sportfelgum, pikadekk á stálfelgum.
Tlf. 311267/211267

TIL SØLU
BMW 524 TD, árg. 89, sóltak, el-rútar, centrallás og alu-felgur. Koyrir sera væl og er í góðum standi.
Tlf. 443264 eftir kl. 18.00

TIL SØLU
Ein Toyota Hiace 2200 Diesel bíliga til sølu.
Tlf. 215291/455291

TIL SØLU
Ein Opel Vectra við sportfelgum, árg. 90 til sølu.
Tlf. 255131

TIL SØLU
Opel Omega 1800i, árg. 86 og ein eyka bil til reservadeilir.
Tlf. 225453

AMBOÐ TIL TANN SERKØNA
HANDVERKARAN. Vit umboða: Makita, Alto, Bacho, Mikatronik. Dekk: 4 stk. 165x65x12 2.400 kr., 4 stk. 175x65x14 2.700 kr. og 4 stk. 185x65x15 3.100 kr. Eldsløkkjarar: Vit levera um alt landi. Leiga ein bil fyri sámuliga pris:
Faroe Trade,
Box 130,
110 Tórshavn,
e.mail: trade@post.olivant.fo.
Tlf./Fax 317865 Mobil 224910

Amboð

YNSKIST
Blandimaskina í góðum standi ynskist til keyps. Stødd 1/2–1 sekk.
Tlf. 424515

SLÁIMASKINA TIL SØLU
Flymo Power Compact 400, sum spildurnýggj, keypt í fjør, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 250145, e. kl. 16

YNSKIST
Til keyps ella leigu – mini gravimaskina (eiturkoppur) – til útgrevstur av einum stórum kjallara.
Tlf. 444784 ella 215784

STÓR BANDSAG
til sølu fyri kr. 5.000,- Er í góðum standi – klingrur fylgja við.
Tlf. 455161 ella 455213
e. kl. 17

MASTER
- hitaovnar
· Hitakanónir
· Gasovnar
· El-hitaovnar
· Infrareyðir ovnar / sólir
· Avfuktarir
· Hitablásari til turking av grasi - serframleitt til Føroysk viðurskifti
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

TIL SØLU
Eldri kompressari við góðum motori. Ford ul. 110 hk - vælegnaður til bát.
Tlf. 211514

Arbeiði

SMIÐIR AT
arbeiða uttanlands. Søkt verður eftir dugnaligum maskinsmiðum/mekanikarum og rørleggjarum at arbeiða uttanlands.
Tlf. 221122

Barnaansing

SØKT VERÐUR EFTIR
ungari gentu ella konu at ansa 7 mðr. gomlum drongi, meðan mamma og babba eru til arbeiðis.
Tlf. 456220 ella 228479

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR
Ein myrkabláur Simo barnavognur v/ lyft, madrassu, kodda, dýnu og regnslagi til sølu fyri 3.200 kr. Sær væl út, bert nýtt til eitt barn. Kostnaður 3.200 kr.
Tlf. 314845

GRULVIGARÐUR YNSKIST
Ein grulvigarður træ og við rimum ynskist. Hava tit ein tit vilja selja bíliga, so ringið til okkum á
Tlf: 252604 ella 421778

BRIO KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Ein bláur BRIO koyristólur til sølu, sær gott út, onki brúktur.
Ring á tlf. 213193

Bátaútgerð

TIL SØLU
Møn Fisherman til sølu.
Tlf. 255655

EITT NEYST
úti í bátahylinum í Sørvági til sølu, hevur nýtt tak.
Tlf. 332893 ella 321893

TIL SØLU
Ein 22 fót glastrevjabátur av slagnum »Sjømann«, við 28 hesta Volvo Penta motori, til sølu.
Tlf. 316022 ella 252922

TIL SØLU
VHF, Kelvin & Hughes, Husum 60. Loran C Navigator, LC 80, Furuno. Ekkolodd, 320 m dýpi, Fuso 102.
Tlf. 373689

BÁTASKRÚVA YNSKIST
Hevur tú eina vinstrasneidda bátaskrúvu, ið er konisk úr 25 í 22 mm? Optimala stoddin er 16x14 - 3 bleð (Møguliga í býti við 17x12)
Jákup, tlf. 327171

STARTARI YNSKIST
Er tað nakar, sum hevur ein startara til Volvo Penta MD6 at selja mær.
Tlf. 214522

YNSKIST
Bátur uml. 8-9 m við fiskiloyvi ynskist bíliga til keyps, alt hevur áhuga. Fiskiloyvi uttan bát hevur eisini áhuga.
Tlf. 216749

Bingo

BINGO
verður í Pállstovu sunnudagin 28. apríl kl. 16.00. At vinna verður m.a. nógvur góður matur. Á lutaseðli eru Apex ferðaseðil Føroyar-KBH, 2 teoriskeið, áteknaður vestur til fø. búna o.a.
B-36 Piltar

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 22. apríl kl. 19.00. Koyring heim aftaná. 15 plátur 100 kr. 15 vinningar á lutaseðlunum. Høvuðsvinningur: Vikuskiftisflogferð.
Astma- & Allergifelagið

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin kl. 16.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli ein vikuskiftisflogferð til DK. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

PENSIONISTAFELAGIÐ
í Havn hevur bingo mikukvøldið 24. apríl kl. 18.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Mikukvøldið 1. mai verður eingin fundur, men vit møtast aftur tann 8.
Nevndin

HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG
hevur bingo í Avhaldshúsinum sunnudagin 21. apríl kl. 16.00. Eykaspæliið 500 kr.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Bingo verður í VB-húsinum 26. apríl kl. 17.
Vágs Bóltfelag

TVØROYRAR KLUBBI
hevur bingo leygarkvøldið 27. apríl kl. 20.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 25. apríl kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
verður dýra biðidag kl. 16.00. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli vikuskiftisferð. Eyka og eyka eyka spæl verða. Øll hjartaliga vælkomin. Koyring heim.
Kyndil

BÁRUBINGO
Stórt bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 6. mai kl. 19.30. Høvuðsvinningur ein uttanlandsferð fyri tvey til Bergen og aftur, frá Smyril Linde. Hetta er seinasta bingo fyri summarsteðgin. Eisini spæla vit minibingo og 20 kr. spæl. Og ikki at gloyma vinningin til fulla plátu á blaðsíðu 10.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 20. apríl kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

RISABINGO
til frama fyri ferð til PartilleCup í Svoriki, verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 20. apríl kl. 15. Nógvir góðir vinningar, m. a. Apex flogferð frá Atlantic Airways, snarferðir frá Smyril Line, fartelefonir, gávukort og mangt, mangt annað.
Foreldrabólkurin

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 13. mai kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum søplini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

TURRIKLÆDI BURTURMIST
Lítið, ljósagrátt bundnaturriklæði horvið eftir kvinnuborðhaldið í Vági 23.2.2002.
Tlf. 373617, Lian

Býli

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt par søkir íbúð í Klaksvík.
Tlf. 250242

TIL SØLU
Hús á Brúgv 15 í Fuglafiði til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444619 - 258961

ÍBÚÐ ELLA LÍTIL HÚS
Søkt verður eftir íbúð ella lítlum húsum í Tórshavn. Súsanna Joensen, tlf. 310700 í arbeiðstíð ella
Tlf. 316619 heima

SUMMARHÚS TIL LEIGU
í viku 22 til 25 í Dronningmølle á Norðsælandi. Ca. 50 min. at koyra til Keypmannahavn centrum. Stór, góð nýggj hús 8-10 sovpláss – nógvir hentleikar – ca. 2 min. til bestu baðistrond.
Tlf. 455835

MØBLERAÐ ÍBÚÐ
í eysturbýnum til leigu í 1 ella 2 mánaðar. 5.000 kr. pr. mðr. inkl. ljós og hita.
Tlf. 253455

ØNSKER DU
en lejlighed eller hus til leje på Eysturoy.
Tlf. 228434

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma, við 10 ára gomlum barni. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 262197

HÚS Á TVØROYRI
til leigu frá 15.5.2002 og 2 ár fram. Deilvíst møblerað. 2.500 pr. mðr.
Tlf. 372199

ÍBÚÐ YNSKIST
Par í 20'unum søkir íbúð í Tórshavn. Fara væl um, gjalda til tíðina.
Tlf. 251400

ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST
til leigu skjótast gjørligt í Tórshavn til sjómannaskúlanæming. Royki ikki og fari væl um. Vinarliga ring
tlf. 217764

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu skjótast gjørligt. Vit eru eitt par við einum 9 ára gomlum barni, ið verða heimleys 1. juni og ynskja eina íbúð í Tórshavnar økinum skjótast gjørligt.
Tlf. 319840 ella 211981 Guðrið

EFTIRLÝSING EFTIR
íbúð í Keypmannahavn ! Í sambandi við skeið ynskja vit at leiga (framleiga) okkum innivist í Keypmannahavn frá 11. mai - 1. juni 2002. Hevur tú eina íbúð til leigu, so vinarligast sig okkum frá á tlf 441632 ella 319192.
Elma og Laila, sjúkrasystrar

ÍBÚÐ
í Bergen til leigu.
Tlf. 447942

HÚS Í SYÐRUGØTU
til leigu frá 1. sept. Áhugaði kunnu ringja á
tlf. 441711

HÚS Á STRONDUM
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 448089 ella 222735

ÍBÚÐ Í ROSKILDE
Uml. 30 fermetrar íbúð í Roskilde kann framleigast frá hálvum apríl til hálvan august.
Tlf. 211298

HÚS TIL SØLU
Hús til sølu á Toftum.
Ringið 448902 og 225471

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
ynskist í býti við hús í Vestmanna frá 1. juni og 4 ella 6 vikur fram.
Tlf. 424770

ÍBÚÐ YNSKIST
Par ynskir íbúð í Havn. Helst tvey kømur. Max. kr. 4.500,- við ljós og hita.
Tlf. 311320, arb., Karla ella 315857 heima

YNSKIST
Íbúð ynskist til leigu í Keypmannahavn frá sept.
Tlf. 317583 ella 004598152447

VIT ERU
4 kristnir 20-28 ára gamlir dreingir, sum ynskja eini hús til leigu frá 1. august.
Tlf. 212739

KAMAR YNSKIST
Er nakar, sum hevur eitt kamar til leigu í Havn, so ring
Tlf. 226250

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu/framleigu. Íbúð/kamar ynskist til leigu ella framleigu í KBH. Eg eri 27 ár, royki ikki og gangi væl um. Alt hevur áhuga. Runir@hotmail.com
Tlf +45 61653237

ÍBÚÐ Í HOYVÍK TIL LEIGU
1. mai til fólk sum fara væl um og ikki roykja. Kr. 5.000 við hita og el + 1 mð. dep. 55 kvm.: Køkur, stova, kamar, baðirúm, kjallararúm, alrúm og durur. Atgongd til vaskimaskinu.
Bill. mrk. 1319-3

TIL LEIGU
Skrivstovuholi til leigu í miðbýnum – 190 fermetrar. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1318-2

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítiðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og vikina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
Tlf. 311197

Dýr

SKJALDBØKA
Hey, er tað nakar, ið vil hava meg, eg eri nokk so stór og umleið 8 ára gomul, so vinarliga ring
tlf. 443345

KETTLINGUR
Kolasvartur, hálvvaksin kettlingur komin at ganga í Hornabø. Hevur hálsreim.
Tlf. 312069

NAKRIR GÁSARUNGAR
4 vikur gamlir, klára seg úti. Ring
tlf. 312016

VILJA TIT HAVA KETTLING?
7. april fekk okkara ketta triggjar fittar kettlingar. Ein hevur ongan hala, ein hevur hálvan hala og ein heilan hala. Vilja tit hava ein, so ring
tlf. 310421 ella 225493

HUNDAHVØLPAR
3 hundahvølpar (hundar) 12 vikur gamlir. Verða latnir djóravini. Undan góðari seyðahundatík.
Tlf. 444750

KILLINGER
Vil du have en eller flere af vores 5 søde, legesyge killinger? De er renlige og har fået ormekur. Født den 25. febr.
Tlf. 441529

EFTIRLÝSING – 4 KANINIR
Vit eftirlýsa eina brúna og hvíta kaninhon, uml. 6 ára gomul, ein svartan og hvítan kaninhann, uml. 1 ára gamal, eina svarta og hvíta kaninhion, uml. 5 ára gomul og eina albino dvørgkanin. Allar sera spakar. Um nakar hevur sæð tær, so vinarliga ring
tlf. 311861, Bjerg

NYMFEPARAKITTAR TIL SØLU
2 nymfeparakittar til sølu fyri 400 kr. stk. Ca. dpult so stórir sum undulátar (par). Hannurin hevur gult høvd við reyðum kjálkum, annars eru teir gráir og hvítir.
Tlf. 447975 ella 252227

LABRADOR TÍK
Vegna flyting selja vit okkara deiligu, fittu labradortík. Ættartalva fylgir við. Hon vil bert búgva hjá fólki í eru góð við hana.
Ring 252604 ella 421778

YNSKIST
Kaninungi ynskist til keyps í norðoyggjum (helst hon)
Tlf. 263392

KETTLINGUR
Ein svartur og hvítur kettlingur verður latin djóravini. Var lagdur 5. mars.
Tlf. 447129/256129

Fundir

HEILAFELAGIÐ
Aðalfundur verður leygardagin 11. mei kl. 17.00 í Føroya Studentaskúla í Hoydølum. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ HØFT
hevur limafund mikudagin 1. mai. Møtið fjølment. Seinasti fundur innan summarsteðgin. Nýggir limir vælkomnir. Kokutombola verður 10. mai í Keypssamtøkuni.
Nevndin

AÐALFUNDUR
Frítiðarfelagið Kaggin hevur aðalfund í hølum felagsins leygardagin 4. mai 2002 kl. 16.00. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

EYKAAÐALFUNDUR
verður í neystinum mánakvøldið 22. apríl kl. 19.00. Skrá: 1) Nevndarval 2) Framtíð felagsins 3) Ymiskt. Heitt verður á allar limir at møta. Nýggir limir kunnu tekna seg.
Argja Róðrarfelag

RÓÐRARFELAGIÐ KNØRRUR
hevur aðalfund 20. apríl kl. 15 (og ikki kl. 12 sum áður lýst) í koyriskúlanum hjá Hans J. Hermansen, Stoffalág 82. Allir limir, nýggir og gamlir, eru vælkomnir.
Nevndin

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR
Lítið brúktur Husqvarna komfýrur (Regina Primeur 60 QSG - 653), hvítur v/ tveimum ovnum, hædd:90 cm, breidd 85 cm, breitt 59,6 cm, djúpd 59,5 cm, bíliga til sølu.
Tlf. 317593

Innbúgv

TIL SØLU
Lítil furu kommoða, d=45, B=70, H=70, 4 skuffur, 200 kr. Runt marmor roykiborð, 60 cm diametur, 200 kr. Hvítt náttborð, D=45 cm, B=45 cm, H=47 cm, 100 kr.
Tlf. 315725

REOL TIL SØLU
162 cm breið, 186 cm høg og 40/49 cm djúp.
Tlf. 316183

TIL SØLU
Sofaborð, sofa og tveir stólar bíliga til sølu.
Tlf. 312537

GONGSMØBIL
Kommoða við 3 skuffum 100 cm. b. 40 cm. h. spegl 75 cm. b. 104 cm. h. til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 424309

LEÐURSOFA
Góð 3 pers. leðursofa (millumbrún) til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310130 eftir kl. 17.00

TIL SØLU
Inventar til wc – wc, bidet, skáp v.m.
Tlf. 311950

TIL SØLU
Tvær sengur við botni og madrassum biliga til sølu.
Tlf. 315465

TIL SØLU
Dupultsong 180 x 200 cm – træ, 2 madrassir 90 x 200 cm, 2 madrassir 70 x 200 cm, selist bíliga.
Tlf. 258105

TIL SØLU
Skrivaraborð til barnakamar, við hill og trimum skuffum. 200 kr.
Tlf. 320325 eftir kl. 15

SOFA YNSKIST
Hornasofa ella 3 pers. sofa og sofaborð ynskist, í góðum standi.
Tlf. 312365 eftir kl. 18

ANTIK YNSKIST
so sum náttborð, kommoða, stólar og annað.
Tlf. 449045, e. kl. 18

TIL SØLU
Ein koyggjusong 90x200, sera solid, kann gerast til 2 einkultar sengur.
Tlf. 223980

TIL SØLU
Ein dupultsong til sølu 180x200, 2 ára gomul, lakerað furutræ, v/ madrassum. Prísuppskot 1.500 kr.
Tlf. 223980

Lutaseðlar

HONDBÓLTFELAGIÐ NEISTIN
14. mars dró Notarius Publicus hesi nummur: nr.
1) 5118 - 2) 6431 - 3) 9250 - 4) 11891 - 5) 8225 - 6) 5558 - 7) 5029 - 8) 10561 - 9) 7958 - 10) 4721. Vinnararnir kunnu ringja 211255. Við tøkk fyri stuðulin.
Hondbóltsfelagið Neistin

3.a Í ARGJA SKÚLA
Mikudagin 17. apríl dró Notarius Publicus hesi nummur:
1. vinningur: Ferð til Íslands við Atlantic Airways, seðil nr. 1818.
2. vinningur: Troyggja frá Tøting, seðil nr. 2355.
3. vinningur: Gávukort á 1300 kr. frá Mariu Poulsen, seðil nr. 2154.
4. vinningur: Gávukort á 500 kr. frá Thomas Dam Amboð, seðil nr. 0789.
5. vinningur: Gávukort á 500 kr. frá Shell, seðil nr. 1475.
Vinnararnir kunnu ringja telefon 283 955. Vinningar, ið ikki eru heintaðir í seinasta lagi 31. mai fella aftur til flokkin. Takk fyri stuðulin,
3.a í Argja skúla

Pløgg

YNSKIST
Eg lati 150 kr. fyri ein gamlan, grønan skótabúna, std. 10-12 ár. Tlf. 314332 ella
316444, Jens Andrias

LEÐURJAKKI TIL SØLU
Lítið brúktur svartur damu leðurjakki, 3/4 longd, std. 36/38, av merkinum H&M, til sølu.
Tlf. 254452

FØROYSK KLÆÐIR
Brúkt skjúrt og troyggja til sølu fyri kr. 2.000,- Aldur: ca. 12-14 ár.
Tlf. 314124 aftaná kl. 18

Samband

SAMBAND YNSKIST
Trúgvandi einkja síðst í 60-árunum, ynskir samband við trúgvani mann um sama aldur. Er hettar nakað fyri teg, so skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn
Bill.mrk. 1321-3

SAMBAND YMSKIST
Eg eri einkja í 60-unum, sum kundi ynskt at komi í samband við ein hugnaligan, ednúuligan mann, sum man kundi farið út at ferðast saman við, og annars at hugna sær saman við. Hevur tú hús og bil, er tað eisini gott. Kanska tú eisini fólir teg einsamallan. Skriva til mín, so kunnu vit tosa saman.
Bill.mrk. 411

Sjavs

EYSTUROYAR CUP
Sjavskapping verður á Strondum sunnudagin 21. apríl kl. 15.00. Leikarar millum fýra tey bestu þarini fáa steyp til ognar.
Strálan og LÍF

Súkklur

DREINGJASÚKKLA
std. 9-12 ár, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310404, Kiran

SÚKKLA TIL SØLU
Súkkla í sera góðum standi til vaksna gentu, hevur 5 innbygd gear, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 321818 / 222866, e. kl. 17.30

MOTORSÚKKLA
Java 350, innregistrerað fyrstu ferð í febr. 98, til sølu um hóskandi boð fæst. Sær gott út.
Tlf. 213119

TIL SØLU
Winther gentusúkkla til ca. 6-7 ár.
Tlf. 449732

MOTORSÚKKLA
Ein Honda motorsúkkla MWX 250F til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332893 ella 321893

APRILIA RX 50
ca 2 ár til sølu – sær gott út og koyrir væl. Prísuppskot: 17.000 kr.
Tlf. 312915 ella 210772

BSA MOTORSÚKKLA
Ein Golden Flagh 650 cc árg. 1953 til sølu. Kr. 39.000,- Súkklan er í góðum standi.
Tlf. 332877 ella 210877

MOTORSÚKKLA
Kawasaki ZXR 400, árg. 95, 67HK, í sera góðum standi, til sølu fyri 55.000 kr. Mynd pr. e-mail
Tlf. 252653

KONDISÚKKLA
Nýggj Kettler kondisúkkla v/ tíð, km, kcal. teljari, puls ur, o.s.fr. einki brúkt, til sølu fyri 2.500,-
Tlf. 224411

CROSS TIL SØLU
1 ára gomul Suzuki RMX 50, svørt og gul, í sera góðum standi og sær væl út, til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 313369

TIL SØLU
Grøn Suzuki GSXR 400R400R, árg. 89, 46.000 km, í góðum standi. Leðurdrakt »Kevlar« blá/hvít/svort kann fylgja við fyri rætta prísin.
Tlf. 220422

DREINGJASÚKKLA
Súkkla til 6-8 ára gamlan drongur til sølu fyri 750 kr. Hevur 4 gear og fót- og hondbremsu.
Tlf. 310251

Teldur

YNSKIST
Nintendo 64 ynskist í býti við eitt Play Station.
Tlf. 310404, Kiran

TIL SØLU
PlayStation við spølum + 2 joystik til sølu.
Tlf. 313867 ella 253267

TELDA TIL SØLU
300 MzH, 64 MB – 3,2 GB. Litprintari og er sera góð til telduviðgerð og internetið (innbygd modem). Til sølu fyri ca. 4.000 kr.
Tlf. 312906 eftir kl. 16

FARTELDA TIL SØLU
Ein Fujitsu Siemens fartelda til sølu fyri 10.000 kr. 1/2 ára gomul. 750 MHz, 160 MB RAM, 12" TFT skerm, netkort fylgir við.
Tlf. 222248

CD BRENNARI
Ein liteon LTR-2410 Retail, 40X/24X/10X / 2MB / IDEvið nero version 5, til sølu fyri kr. 1100.
Tlf. 313471

GRAFIKKORT
Daytona GeForce4 MX440 TV-Out AGP / 64MB / 2048X1536, til sølu fyri kr. 2300.
Tlf. 313471

JOYSTIK YNSKIST
Joystik til Nintendo 64 ynskist til keyps.
Tlf. 315397

HYGG HER!
Ein 3 mðr. gamal X-box til sølu fyri 4.000,- við 2 joystik, 1 memory card og 3 spøl: Tony Hawk 3, Halo og Diad or Alive 3.
Ring 227562

TIL SØLU
Proff skannari fyri negativum/positivum: Nikon Coolscan 4000 dpi. Nýggj 18.000 kr., til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 448979, Jens

GRAFIKKKORT TIL SØLU
Eitt InnoVISION GeForce 2 Titanium grafikkort við 64 MB DDR RAM,WINDVD og onnur forrit fylgja við til sølu fyri 1500 CD-BRENNARI. Eisini er ein plextor 12/10/32A brennari til sølu fyri 1000.
Tlf. 253006

SPØL TIL SØLU
Deltuspøl – Delta Force, Sout Park Rally, Mech Warrior 3, Team Apache 150 kr. stk. Mech Warrior Vengeance 200 kr.
Tlf. 443334

TELDUSPØL TIL SØLU
Hugo, Rayman, Disneys Magic Artist, Magnus og Myggen, 50 kr. stk.
Tlf. 443334

TIL SØLU
Umleið 3 ára gomul telda til sølu. Windows '98, 64 mb ram, 150 mhz, Microsoft Office pakkin. Innbygdur + Canon BJC 1000 printari.
Tlf. 317593

TIL SØLU
Spildurnýggj telda 1000 Mhz AMD Duron, Maxtor 40 Gb HD, cd-drev, scroll mús o.s.v. selist uttan skerm. Prísuppskot 5.100 kr.
Tlf. 317376

Tónleikur

OZZY
Síðsti kjansur nakrantið at síggja Ozzy Osborne live. 10. juni í Valby Hallen, atgongumerki kunnu keypast á www.billetnet.dk Kom og ger ein rock-túr burturúr tí.
posttilmig@hotmail.com

PUMPUORGUL
Eldri pumpuorgul, Joh. P. Andresen & Co., Ringkjøbing, bíliga til sølu.
Tlf. 424091

TIL SØLU
Ein 12-streingja Cort kassaguittar til sølu fyri 1.200 kr. Er lítið og einki brúktur, er sum nýggjur.
Ring á tlf. 251016

PLÁTUSPÆLARI YNSKIST
Lítið brúktur plátuspælari ynskist til keyps.
Tlf. 361004

TIL SØLU
Ein lítið brúkt Zoom BFX-708 basspedal til sølu. Nýprísur 1990 kr.
Tlf. 253468

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Technics stereo anlegg við leysum hátalarum við fóti.
Tlf. 449732

Ymiskt

OZZY
Síðsti kjansur nakrantið at síggja Ozzy Osbourne live. 10 juni í Valby Hallen. Atgongumerki kunnu keypast á www.billetnet.dk – Kom og ger ein rock-túr burtur úr tí.
ozzyfan02@hotmail.com

CUMMENS MOTORUR TIL SØLU
Brúktur Cummens motorur til sølu – 210 HK – egnaður til eykalutir.
Tlf. 448404

LOFTSSTIGI
Tripp-Trapp loftsstigi. Lítið brúktur, bíliga til sølu vegna umbygging.
Tlf. 316238
ella 216238

RULLISKOYTUR
Nýggjar rulliskoytur til sølu fyri 600 kr. Nr. 42. Bert brúktar eina ferð.
Tlf. 258656

YNSKIST
Ein HP 15 C lummaroknari ynskist til keyps.
Tlf. 213373

TRÁÐLEYS TELEFON
Ein 1 1/2 ára gomul og vælhildin Ericsson 260 tráðleys telefon til sølu. Dygdargóð, vigar 139 gram, DECT ljóðgóðska, vís nummar, digitalan telefonsvarara, innbygda telefonbók o.a. Nýprísur kr. 2000,- . Tú fær hana fyri kr. 1.000.
Ring 218500

FILMUR YNSKIST
Er nakar, sum kann selja mær »The Lost World« bíliga.
444821

HUGNAKVØLD Í KAGGANUM
Leygardagin 27. apríl kl. 19.00. Til matna: Turt kjøt og stokt riv. Tekningarlisti liggur í barrini, kostnaður 150 kr.
Nevndin

Lýsingartekstur

_____
___